# BUDAM SLEPPUR SÍNUM EGO

HESUFERÐ ER TAÐ SØGUNA, OG IKKI MEG ELLA **MÍN FEITA TÓNLEIK**, TAÐ SNÝR SEG UM, SIGUR **BÚI DAM**, SUM HEVUR SKRIVAÐ TÓNLEIKIN TIL STÓRSLIGNU UPPSETINGINA AV LEIKINUM **»AFTAN Á UNDRIÐ«**



TÓNLEIKUR
Anna V. Ellingsgaard
anna@sosialurin.fo

Eyðkendu tónarnir røkka heilt út í gongina á Tjóðpallinum og avdúka skjótt, at her kann talan næstan bara vera um ein av okkara mest sermerktu tónleikarum. Og rætt er. Í einum heldur skýmligum horni situr Búi Dam, eisini kendur sum Budam, og boksar við klaverið. Hesuferð heldur hann seg í bakgrundini, meðan ein meldur av leikarum dansa og syngja á pallinum í besta cabaret stíli til spildurnýggja tónleikin, sum Búi Dam hevur skrivað til leikin »Aftan á Undrið« eftir Jóanes Nielsen.

### Hjálpir hetta?

Onkur tónleikabrot eru so fesk, at tey enn verða broytt saman við sjónleikarnum og gittarleikaranum Rógva á Rógvu, nú seinasta hond verður løgd á venjingarnar, áðrenn frumframførsluna

> »Um mín tónleikur ikki hjálpir leikararnum ella styrkir søguna, kann tað vera fullkomiliga líka mikið, hvussu feitan eg sjálvur haldi tónleikin vera

leygardagin. Sjálvur er tónasmiðurin í essinum hesa løtuna, meðan cabaret-tónleikurin røkkur einum budam'skum hæddarpunkti í bakgrundini.

– Tað passar mær perfekt at sleppa at gera tónleikin til hendan leikin, tí her er alt eitt sindur skeivt og dreymakent við eini rúgvu av løgnum karakterum, sigur Búi Dam.

Júst hvat slag at tónleiki, talan er um, heldur hann vera eitt sindur ringt at siga, tí tað hendir so nógv ymiskt í leikinum, og tað endurspeglar tónleikurin. So her er eitt sindur av hvørjum, eitt sindur av rock, cabaret, stillum balladum, popp og so víðari.

– Tað veldst um, hvat eitt ávíst brot ella ein leiklutur hevur brúk fyri. Tí royni eg eisini at spyrja leikararnar „Hjálpir hetta tónleikastykki tær?, Gevur tað tær nakað? o.s.fr“. Ger tað ikki tað, kann tað vera fullkomiliga líkamikið, hvussu feitan eg sjálvur haldi tónleikin vera, sigur Búi Dam.

Júst hetta at seta seg sjálvan til viks sum tónleikari, var eisini nakað av tí fyrsta, Búi Dam lærdi á sjónleikaraskúla í London, har hann hevur gingið seinast árið. Tónleikurin í sjónleiki hevur nevniliga bara eina uppgávu, og tað er at styrkja søguna og fáa hana betri fram, minnir hann á.

– Tí noyddist eg eisini, sum eitt tað fyrsta, at sleppa mínum tónlistarliga ego, og tað var eitt sindur av eini avbjóðing, sigur Búi Dam og sipar til, at hann sum singer/songwriter er vanur at stýra tónleikinum, har hann vil.







*Søgan í sjónleikinum »Aftan á Undrið« fær enn eitt skump frá nýskrivaða tónleikinum hjá Búa Dam*

### Deiliga befríandi

Kortini hevur hann á ongan hátt kent seg bundnan av, at onnur nú sita við kreativa róðrið.

– Avgjørt ikki. Tað er deiliga befríandi og sera inspirerandi at arbeiða saman við so nógvum øðrum listafólkum og listagreinum. Tað verði eg bara meir kreativur av, sigur Búi Dam.

Tónleikur kemur jú ikki ongastaðni frá, minnir hann á. Tí kann man eisini ofta blíva læstur inni í síni egnu musisku verð, um onki nýtt kemur útifrá.

– Til dømis sigur Neil Young, at hann plagar at fáa sær ein nýggjan gittara, tá hann hevur brúk fyri nýggjum íblástri. Tað ljóðar jú ikki serliga kollveltandi, men ofta skal tað heldur ikki so nógv til, fyri á fáa tankarnar at glíða onkran annan veg.

Fyri Búa Dam hevur íslendski leikstjórin, Guðjon Pedersen, hesuferð verið vegvísari, tá glið skuldi fáast á.

– Eg byrjaði sjálvandi við at lesa handritið, men á tí stiginum í prosessini vóru tað bara orð á pappíri. Tað var ikki fyrr ein leikstjórin kom og dirigeraði hugflogið í eina ávísa kós, at eg visti, hvønn veg orðini skuldu fara.

### Undirmettur tónleikur

Tí setur Búi Dam eisini stóran prís uppá, at hava verið við í arbeiðinum líka frá byrjan.

Ofta koma tónleikararnir nevniliga ikki inn í myndina, fyrr enn arbeiðið við einum sjónleiki er komið væl ávegis, og tá má man bara royna at fóta sær sum frægast, greiðir hann frá.

– Tað er sjálvandi ikki serliga nøktandi, og úrslitið verður ofta hareftir. Her havi eg fingið alla ta tíð, eg havi havt brúk fyri, so tað hevur verið eitt satt fornøjilsi.

Eftir hansara tykki hava fólk ofta lyndi til at undirmeta týdningin, sum tónleikur hevur í sjónleiki.

Kanska hongur tað saman við, at tá hann veruliga riggar, so gevur tú tær ikki far um tónleikin í einum sjónleiki. Hugsa bara um filmar. Har leggur tú heldur ikki merki til tónleikin, fyrr enn hann ikki er har ella er beinleiðis vánaligur.

Í leikinum »Aftan á undrið« verður tað gittarleikarin Rógvi á Rógvu, sum spælir live-innsløgini á palli. Restin av tónleikinum er spælt inn á fløgu, sum Búi Dam hevur ætlanir um at geva út seinni.